MEGD
Faroe Islands` Union for the Handicapped

Almannamálaráðið
Eirargarður 2
100 Tórshavn

Tórshavn 15.11.2019
J. nr.
Viðgjørt J. Christiansen
Tykkara j. nr.19/00853

Viðvíkjandi lógaruppskotum til hoyringar:

1. Løgtingsmál nr. 10/2019: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almannapensjónir o.a. (lækking av mótrokning)
2. Løgtingsmál nr. 11/2019: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum (Hækking av grundupphædd og lækking av frádráttarfríari inntøkuupphædd)
3. Løgtngsmál nr. 20/2019: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti (Ásetingarlógin) (Skattafrádráttur á kr. 6.000 um árið til fólkapensjónistar)

MEGD hevur hesar viðmerkingar

**Viðmerkingar til løgtingsmál nr. 10/2019:**

MEGD fegnast um, at inntøkurnar hjá fólkapensjónistum hækka við hesum lógaruppskoti, men um broytingarnar fara at minka um arbeiðsvirknið hjá teimum pensjónistum, sum ynskja at arbeiða eitt sindur, er tað sera óheppið, sæð út frá einum virknis-, lívsgóðsku og samfelagssjónarhorni. Sí útgreining hesum viðvíkjandi í viðmerkingunum til løgtingsmál nr. 11/2019.

MEGD tekur ikki undir við, at grundupphæddin verður lækkað hjá teimum, sum eru fødd aftan á 31.12.1952.

**Viðmerkingar til løgtingsmál nr. 11/2019:**

MEGD tekur ikki undir við, at frádátturin lækkar úr 61.900 og 60.000 niður í 40.000 krónur. Tað er óheppið, um hendan broyting hevur við sær, at færri pensjónistar, sum hava eina lítla inntøku, fara at halda seg aftur, tí tað ikki loysir seg at arbeiða. Hyggja vit eftir viðurskiftunum í Ríkisfelagsskapinum, hevur Danska Fólkatingið júst viðtikið at hækka hesa upphæddina til 122.004 kr. áðrenn tað verður mótroknað í pensjónini, og enntá við afturvirkandi virknaði frá 1. januar 2019. Hendan broyting er gjørd júst fyri, at tað skal vera meira attraktivt hjá fólkapensjónistum at arbeiða.

Viðmerkingar til talvu 5 og 6. Talva 5 - ógiftur: Eftir útrokningunum at døma fyri komandi pensjónistar, sær tað út til, at tey, sum forvinna minst millum 50.000 -100.000 krónur fáa minst, og at tey sum forvinna millum 150.000-500.000 kr. fáa mest burturúr.

Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
The Faroe Islands
Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

Hetta átti heldur at verið øvut, fyri at tryggja teimum javnbjóðis møguleikar, sum ikki hava havt møguleika at spart upp til pensjón og ella fyri at hava eyka inntøku sum pensjónistur.

Talva 6 (giftur ongin mótrokning) á sama hátt: 50.000-100.000 fáa minst og 150.000 – 350.000 fáa mest.

**Viðmerkingar til løgtingsmál nr. 20/2019:**

MEGD fegnast um, at pensjónistar fáa ein skattafrádrátt á ávíkavist 3.000 kr í 2020 og 6.000 kr í 2021.

Vegna MEGD

Jónvør Christiansen, aðalskrivari